Tilbúgvingarstovnur Føroya
Faroese Emergency Management and Inspection Agency

# VEGLEIÐING

**Nýtsla av bjálvingartilfari úr t.d. selluplast/polystyrene/EPS, ið ikki lúka krøvini sum í minsta lagi flokkur B *[D-s2,d2]* til bygningar, har gólvið í ovastu hædd ikki er hægri enn 5,1 m omanfyri lægsta jørðildi.**




Tinghúsvegi 64 • FO-100 Tórshavn • Tlf. +298 356610 • Fax +298 356611 • tbsf@tbsf.fo • www.tbsf.fo

## Treytir fyri at nýta bjálving slakari enn flokkur B [D-s2,d2] t.d. selluplast/Polystyrene/EPS.

| | | |
|---|---|---|
|  | **Undir betonggólv niður á lendi (KBB-99, 7.6.-2b)**<br>BS-húsalutur 60 *[EI 60 A2-s1,d0]* uttan aðrar treytir. | Vanligt 100 *mm* betonggólv. |
|  | **Millum betongvegg og inn móti beni (KBB-99, 7.6.-2b)**<br>BS-húsalutur 60 *[REI 60 A2-s1,d0]* uttan aðrar treytir. | Vanligur 150 *mm* betongveggur. |
|  | **Á tekju (KBB-99, 7.6.-2c)**<br>Tekjan skal verða í minsta lagi úr BD-húsaluti 30 *[EI 30]* og ikki størri enn 100 $m^2$. | Sperrur við 19 *mm* krossviði, 100 *mm* miniralull, sum er hildin føst, og á undirsíðuni við klæðing úr 2. flokki *[K1 10 B-s2,d2]*. |

## Treytir fyri at nýta bjálving slakari enn flokkur B [D-s2,d2] t.d. selluplast/Polystyrene/EPS.

| | | |
|---|---|---|
|  | **Í veggjum millum skins og hold (KBB-99, 7.6.-2a)**<br>BS-húsalutur 30 *[REI 30 A2-s1,d0]*. | Í veggjum við betong ella laðaðum steini báðumegin |
| <br> | **Á veggir innandura á betonghúsum og undir skilagólvi úr betong**<br>Á veggir innandura á betonghúsum og undur skilagólvi úr betong, treytað av at klætt verður við í minsta lagi BS-húsaluti 30 *[EI 30 A2-s1,d0]*, soleiðis at bjálvingin er at roknað sum millum skins og hold.<br><br>Bjálvingin, skal vera føst og samanhangandi í plátum ella rullum.<br><br>***1** Ikki berandi BS-veggur 30 *[EI 30 A2-s1,d0]* .<br><br>*Út frá eini heildarmeting sambært KBB-99,1, 1.2.-1, 7.6.-2 og 27.-1., kann kommunan loyva at klætt verður innan við í minsta lagi BD-húsaluti 30 [EI 30] við klæðing úr 2. flokki [$K_1$10 B-s2,d2] í staðin fyri BS-húsaluti 30 [EI 30 A2-s1,d0].*<br><br>***2a** Ikki berandi BD-veggur 30 *[EI 30]* við klæðing úr 2. flokki *[$K_1$ 10 B-s2,d2]*.<br><br>***2b** Klæðing úr flokki 1 *[$K_1$10B-s1,d0]*. | ***1**<br>Tungur veggur er t.d. úr 75 *mm* jarnstyrktum elementum úr autoklaveraðum lættbetongi, autoklaveraðum lættbetongiblokksteini ella 110 *mm* veggur úr klinkubetongi.<br><br>Léttur veggur er t.d. úr 70 *mm* stálprofilum við einum fráleika, sum er í mesta lagi 450 *mm* frá miðju til miðju og, klæddir á innsíðuna við flokki 1 [*K110B-S1,d0*]. Fráleikin millum bjálvingina úr t.d. selluplast/Polystyrene /EPS og klædningin á í minsta lagi 70 *mm*, fylt út til fulnaðar við miniralull flokkur B *[D-s2,d2]*, sum verður hildin føst.<br><br>***2a**<br>Veggur er t.d. úr í minsta lagi 45 x 45 *mm* timburstólpum við einum fráleika, sum er í mesta lagi 600 *mm* frá miðju til miðju og klæddir á innsíðuna við, tvífaldum klædningi úr plátum úr flokki 2 *[$K_1$10D-s2,d2]*. Fráleikin millum bjálvingina úr t.d. selluplast/Polystyrene/ EPS og klædningin á í minsta lagi 45 *mm* fylt út til fulnaðar við miniralull flokkur B *[D-s2,d2]*, sum verður hildin føst. |

## Treytir fyri at nýta bjálving slakari enn flokkur B [D-s2,d2] t.d. selluplast/Polystyrene/EPS.

| | | |
|---|---|---|
|  | | ***2b**<br>Í staðin fyri 45 x 45 *mm* timburstólpar pr. 600 *mm* kann tað verða 25 x100 *mm* forskalling pr. 300 *mm* fest gjøgnum bjálvingina í betongið, og klætt á innsíðuni við tvífaldum klædningi úr plátu sum er flokkur 1 *[K110B-S1,d0]*. Fráleikin millum bjálvingina úr t.d. selluplast/Polystyrene/ EPS og klædningin á í minsta lagi 25 *mm* fylt út til fulnaðar við miniralull flokkur B *[D-s2,d2]*, sum verður hildin føst.<br><br>**Tilvísing til KBB-99:**<br>*1.2.-1 Almennar ásetingar*<br>*7.6.-2 Bjálving*<br>*27.-1 Undantaksloyvi* |
|  | **Á veggir uttandura á betonghúsum**<br>Á veggir uttandura á betonghúsum sum eru ikki hægri enn 3. hæddir (í mesta lagi 5,1 *m* frá lægsta jørðildi til ovasta skilagólv) íroknað kjallaran ella 2 hæddir og høga reising.<br><br>Bjálvingin úr t.d. selluplast/Polystyrene/EPS, skal vera føst og samanhangandi í plátum ella rullum og skal klæðast við tilfari, ið ikki er lakari enn tilfar úr flokki 2 *[K1 10 D-s2,d2]*.<br><br>**3 Út frá eini heildarmeting sambært KBB-99,1, 1.2.-1, 3.-6, 7.6.-3, 8.2.-3 og 27.-1., kann kommunan loyva at bjálva verður uttan á betong bygningum, BS-húsaluti 60 [EI 60 A2-s1,d0], við bjálvingartilfari lakari enn flokkur B [D-s2,d2] við klæðing uttan úr í minsta lagi 2. flokki [K1 10 D-s2,d2].*<br><br>Í bygningum ella pørtum av bygningum sambært *KBB*-99, 10., 11., 12., 13., 14., 15., 18. og 19. svarandi til nýtsluflokkar 3, 4, 5 og 6, má ongastaðni nýtast bjálving í húsalutum ella klædningur úr selluplast/polystyren/EPS ella tílíkum tilfari.<br><br>Í bygningum ella pørtum av bygningum sambært *KBB*-99, 8., 16.1.-2., og 17. svarandi til nýtsluflokkar 1 og 2, (hetta er ikki galdandi fyri aðra bygging sambært *KBB*-99, 10.2., 11.-2., 12.-2., 13.-2., 14.-2., 15.-2., 18. | ***3**<br>Í hesum sambandi skal kommunan biðja um váttan frá byggiharra um, at ynskta loysn ikki stríður móti endamálinum í *KBB*-99, 1.2.-1 og at hetta frávikið ikki t.d. krevur ein størri fráleika til grannamarki, miðjuni á gøtum og vegum enn teir 2,5 *m* sambært *KBB*-99, 3.-6 og 8.2.-3.<br><br>**Tilvísing til KBB-99:**<br>*1.2.-1 Almennar ásetingar.*<br>*3.-6 klæðing sum lætt festir í.*<br>*7.6.-3 Bjálving.*<br>*8.2.-3 Enbýlishús, fróstøða.*<br>*27.-1 Undantaksloyvi.*<br><br><u>Frávik ikki loyvt:</u><br>*Kap.10- Gistingarhús.*<br>*Kap. 11-Sjúkrahús og røktarheim.*<br>*Kap. 12-Samkomuhús.*<br>*Kap. 13-Undirvísingarhøli.*<br>*Kap. 14-Dagstovnar.*<br>*Kap. 15- Handlar og sølubygningar.*<br>*Kap. 18-Skrivstovuhøli.*<br>*Kap. 19-Landbúnaðarbygn.*<br><br><u>Frávik loyvt:</u><br>*Kap. 8-Einbýlishús og sethús.*<br>*Kap. 16.1.-2 Skrivstovudeild í mesta lagi 150 m².* |

| | | |
|---|---|---|
| | og 19.-5) kann bjálving nýtast í húsalutum ella klædningur úr selluplast/polystyren/ EPS ella tílíkum tilfari um fráleikar sambært *KBB-99*, 3.-6 eisini í minsta lagi verða yvirhildnir umframt byggiloyvi frá avvarðandi kommunu. | *Kap. 17-Ídnaðar- og goymslubygn. í einari hædd.*<br><br>Nýtsluflokkar: Víst verður til donsku eksempelsamlingen om brandsikring af byggeri. *www.ebst.dk/publikationer* |

**Prosjekttilfar:**
Áðrenn byggiloyvi verður givið, skal avvarðandi kommuna hava nøktandi prosjekttilfar.

Umframt vanligt myndugleikaprosjekt (sí faldaran "sethúsabygging" á www.torshavn.fo ), skal prosjekttilfarið, tá tílík bjálving úr selluplast/Polystyrene/EPS verður nýtt, eisini innihalda:

a. Nøktandi lýsing av tilfari, sum selluplast/polystyren/ EPS, ella líknandi.
b. Skurðir av bygningslutum har selluplast/Polystyrene/EPS verður nýtt.
c. Sertekningar har selluplast/Polystyrene/EPS verður nýtt, m.a. samlingum millum loft/gólv, útveggur/skilaveggur v.m., umframt av úrsparingum við vindeygu, hurðar v.m.
d. Tað skal framganga av prosjektinum hvussu bygningslutirnir verða festir, har selluplast/Polystyrene/EPS verður nýtt.

**Dømir:**
Tilfar úr flokki 2 *[$K_1$ 10 D-s2,d2]* er t.d.:
Einki tómt rúm aftanfyri:

- 15 *mm* samanpløgdar ráar, sagaðar ella hølvaðar fjalir.
- 7,5 *mm* krossviður við rúmvekt í minsta lagi 500 $kg/m^3$.
- 6 *mm* trýsteldimprægneraður krossviður.
- 9 *mm* samanpløgdar ráar, sagaðar ella hølvaðar fjalir, sum eru trýsteldimprægneraðar.

Tilfar úr flokki 1 *[$K_1$ 10 B-s1,d0]* er t.d.:

- 1,8 *mm* eternitplátur.
- 9 *mm* gipsplátur.
- 9 *mm* trýsteldimprægneraður krossviður.
- 21 *mm* samanpløgdan ráar, sagaðar fjalar, ið eru trýsteldimpregneraðar.

## Treytir fyri at nýta bjálving slakari enn flokkur B [D-s2,d2] t.d. selluplast/Polystyrene/EPS.

**Ásetingar um bjálvingartilfar, sambært KBB99 (kunngerð um brunaverju og brunatrygd):**

*Bygningar har gólvið í ovastu hædd er hægri enn 5,1 m omanfyri lægsta jørðildi skulu altíð verða bjálvaðir við tilfari, ið er í minsta lagi flokkur A [B-s1,d0].*

***1. <u>Skylda um byggimálsviðgerð.</u>***

*Í sambandi við at kommunalur byggimyndugleiki veitir byggiloyvi, hevur hann skyldu til at gera eina meting av øllum byggimálum og seta tey krøv, ið neyðug eru at tryggja, at almennar ásetingar um brunatrygd verða fylgdar. Er talan um eldhættislig virki o.a.m., sum koma undir reglurnar í § 21. stk. 1, og § 25. stk. 2, í lógini skal kommunali byggimyndugleikin, áðrenn byggiloyvi verður givið, útvega sær loyvi frá Brunaumsjón landsins (okkara viðm. núverandi Tilbúgvingarstovnur Føroya).*

*1.2.-1 Allar byggingar skulu útinnast og innrættast á slíkan hátt og vera úr tílíkum tilfari, at tær geva nøktandi trygd fyri eldi, og at eldurin ikki breiðir seg á egnum grundøki, innanhýsis og til grannabyggingar. Byggingar skulu geva fólki, sum eru inni, góða trygd og góðar møguleikar at sleppa til rýmingar út, tá eldur er í. Góðar umstøður skulu vera at sløkkja eld og at bjarga fólkum út.*

*a. Byggingar skulu fremjast við atliti til ta nýtslu, tær eru ætlaðar til, soleiðis at ásetingar kunnu herðast, t.d. har talan er um bygningar, ið skulu nýtast av rørslutarnaðum, í sambandi við krøv um rýmingarleiðirnar, og annars har serligur eldhótti er.*

*3.-6 Bygningar við klædningi ella tekju sum eldur lætt festir í, skulu vera minst 10 m burtur frá grannamarki, vegmiðju og øðrum bygningum.*

*7.6. Bjálvingartilfar.*

*7.6.-1 Bjálvingartilfar skal vera gjørt úr tilfari, sum ikki kann brenna. Konstruktiónir og húsalutir við bjálvingartilfari, sum kann brenna ella er gjørt úr lívrunnum tilfari, kunnu einans nýtast, eftir at serstøk góðkenning er fingin frá brunamyndugleikunum.*

*7.6.-2 Bjálvingartilfar úr selluplast og úr øðrum góðkendum lívrunnum tilfari, kann uttan aðra góðkenning nýtast í hesum førum:*

*a. Í veggjum millum skins og hold við betong ella laðaðum steini báðumegin.*
*b. Undir betonggólv niður á lendi.*
*c. Á tekjur sum eru í minsta lagi úr BD-húsaluti 30 og eru ikki størri enn 100 $m^2$.*

*7.6.-3 Tílík bjálving á veggir kann nýtast uttandura á betonghúsum, sum eru ikki hægri enn 3. hæddir íroknað kjallaran ella eru háttað eins og tilskilað í 7.5.-1. Bjálvingin, skal vera føst og samanhangandi í plátum ella rullum og skal klæðast við tilfari, ið ikki er lakari enn tilfar úr flokki 2. Í samkomuhølum og rýmingarleiðum má ongastaðni nýtast bjálving í húsalutum ella klædningur úr selluplast ella tílíkum tilfari.*

**Treytir fyri at nýta bjálving slakari enn flokkur B [D-s2,d2] t.d. selluplast/Polystyrene/EPS.**

| | |
|---|---|
| *8.2.-3* | *Einbýlishús, ið eru nærri hvørjum øðrum enn 5 m, skulu skilast hvørt frá øðrum við veggi, sum er í minsta lagi sum BS-húsalutur 60 ella BD-húsalutur 90. Tílíkir veggir, sum horva hvør móti øðrum skulu hava fullgóða brunaliga dygd upp undir tekjuna.* |
| *8.3.-1* | *Uttan og innandura skulu veggjaklæðingar og vindtætt klæðing í ongum førum vera úr tilfari, sum brunaliga ikki er eins gott og klædningur úr flokki 2..* |
| *27.-1* | *Byggivaldið kann geva smávegis lættar í ásetingunum í hesari kunngerð.* |
| *27.-2* | *Er ósemja í bygda(r)ráðnum um, hvussu ein lætti er at skilja, tekur Brunaumsjón landsins (okkara viðm. núverandi Tilbúgvingarstovnur Føroya) avgerð.* |